

*Brynhild Thomsen, journalistur og feministur, hevði sminkað sær æðraknútarnar til dagsins uppgávu: at vera vertinna á kvinnudegnum.*
*Brynhild dugur sum fáur at siga tað, og helt eitt framúrskarandi upplegg um kvinnuleiklutin í dag. Eitt nú skýrdi hon felagsskapin Demokratia fyri Fikublaðið hjá mannliga landsstýrinum.*
*Í innlegginum vísti hon á, at ovurnýtslan av kallkynsforminum er ekskluderandi málburður, tí kallkynið er normurin, meðan kvennkynið er hitt kynið.*
*Eisini talaði hon um fráløruna í fólkaskúlanum, har bæði gentur og dreingir bert læra søguna um menn, og lesa søgur um menn.*
*- Kvinnurnar eru sóttreinsaðar úr søguni og málburðinum. Um kvinnuavrikini verða nevnd, so verða tey rópt kvinnubókmentir, kvinnulist og kvinnusøga. Hetta avskeplar og ekskluderar kvinnurnar, segði Brynhild Thomsen, sum retoriskt spurdi, hvat hetta mann gera við samleikan hjá gentum.*
*Eitt hugtak, sum Brynhild fleiri ferðir nevndi, var orðið kynsbrillur.*
*- Sum støðan er í dag, hava vit ein blindan vinkul í útsýninum, og tí skulu kynsbrillurnar altíð sita á næsunum, so vit fáa víðvinkulin á, segði Brynhild.*
*Til endans í innleggi hennara gjørdi hon gjøldur burturúr politisku skipanini, og heitti staðiliga á politisku flokkarnar um at pussa rustaðu floksaparatini, og kanska eisini at brúka orku til at førleikamenna nakrar av mannligu politikarunum, sum ikki altíð eru teir hvassastu knívarnir í skuffuni.*
*- Og skiftið so einar tríggjar av teimum mest lendahoknu landsstýrismonnunum út, var áheitan hennara.*

# Turið Debes Hentze kosin 8. mars kvinnan

**Rumblið í sambandi við kvinnutiltakið er eitt tekin um lív og engagement, og at vit flyta okkum, segði advokaturin og feministurin Turið Debes Hentze, sum varð kosin 8. mars kvinnan**

**8. MARS**
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*

Vinnarin av kappingini um at gerast ársins 8. mars kvinna, var ikki sjálv til staðar í gjár, tá blaðið Kvinna avdúkaði úrslitið av atkvøðugreiðsluni. Kortini trein smílandi andlit hennara fram á øllum teimum fýra stórskýggjunum í salinum, og slapp hon soleiðis at flyta fram eina lítla takkarrøðu yvir Skype.

- Rumblið sum hevur verið í sambandi við hetta tiltakið er eitt tekin um tað tronga rásarúmið, sum vit kvinnur liva undir. Tað er eitt tekin um, at tá onkur flytur seg, so hendir okkurt. Tí er rumbul eitt gott tekin um lív og engagement og betur enn at verða burturgloymd og burturtagd, segði Turið Debes Hentze, advokatur.



Eisini segði hon, at ráðstevnan um kvinnur og javnstøðu við 650 luttakarum var eitt flott tiltak.

- Vit kunnu fegnast um tiltakið og er tað avgjørt eitt tekin um, at okkurt er um at henda her á landi, segði Turið Debes Hentze millum annað, tá hon varð heiðrað á 8. mars tiltakinum á Hotel Føroyum

## Grundgevingin

Innstillað til heiðurin vóru 266b bindiklubbin, Annita á Fríðriksmørk, Laila Solmunde, Marjun Bæk og Turið Debes Hentze.

Í grundgevingini fyri at innstilla Turið Debes Hentze stóð soleiðis:

- Advokaturin og feministurin við tí greiðu almennu røddini er útnevnd fyri sítt stóra íkast til javnstøðuarbeiðið í Føroyum.

Turið Debes Hentze er ímyndin av eini sterkari føroyskari kvinnu, sum við professionalismu og persónligum engagementi altíð er tilreiðar at blanda seg í almenna orðaskiftið. Tá hon tekur orðið í javnstøðukjaki, sker hon inn á bein og avlívar stereotypar lýsingar av, hvussu kvinnur eru ella "eiga at vera".

Nøkur ár eru liðin, síðani hon arbeiddi sum forkvinna í Javnstøðunevndini. Men líka síðani hevur hon verið ein autoritetur innan javnstøðuarbeiði og hevur spælt og spælir enn ein stóran leiklut í javnstøðuarbeiðinum í Føroyum.



# Málsviðgeri til Almannastovuna

**Á økisdeildini í Havn er eitt starv leyst at søkja.**

Arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá deildini er at ráðgeva og vegleiða borgarum um rættindi og skyldur viðvíkjandi almannaspurningum, at seta í verk fyriskipanir sambært almannalóggávuni og í serligum førum vísa áheitanum til serdeildir á stovninum.

**Arbeiðsuppgávurnar hjá málsviðgerunum eru hesar**

- Vegleiða borgarum um rættindi og skyldur
- Útrokna og ávísa veitingar
- Skriva játtanarskriv
- Journalisering
- Taka ímóti viðskiftafólki og taka telefonina
- Taka avgerðir í ávísum málum
- Loysa aðrar fyrifallandi uppgávur.

**Vit kunnu bjóða**
Eitt starv í einum spennandi umhvørvi í støðugari menning við nógvum og fjølbroyttum avbjóðingum, har møguleiki er fyri persónligari og fakligari menning.

**Førleikakrøv**

- Skrivstovuútbúgving, merkonom, HH ella onnur viðkomandi útbúgving og royndir
- Góður kunnleiki til KT
- Góður málsligur førleiki

**Setanar- og lønarviðurskifti**
Eru sambært Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið.

**Meiri fæst at vita um starvið**
við at venda sær til Rúna Rasmussen, deildarleiðara, á telefon 35 35 70.

**Umsóknir**
Sendið umsókn við avriti av prógvum o.ø. til:
Almannastovuna
Smyrilsvegur 20
Postsmoga 3096
110 Tórshavn.

í seinasta lagi mánadagin 26. mars 2007 kl. 12.00.

almannastovan
www.almannastovan.fo

KREA.FO - TEL 47 80 80